# Takið orðakifti um oljuframtíðina nú

**-Eg fari ikki at leggja meg út í orðaskiftið um, hvat tit skulu við eini oljuvinnu, men eg vil kortini mæla tykkum til at seta hol á orðaskiftið um, hvat tit vilja við hesi vinnu nú alt fyri eitt sigur John Thorogood frá BP**

OLJA OG SAMFELAG
*Jan Müller*

Hóast John Thorogood er tøkningur og tekur sær av sjálvari boringini, so kemst ikki uttan um, at hann við drúgvu royndum sínum frá nógvum ymsum londum, eisini hevur eina meining um, hvat kann henda í Føroyum uppá gott og ilt. -Eg fari sjálvandi ikki at leggja meg út í, hvat er rætt og ikki rætt at gera í Føroyum, finna vit nógva olju. Men eg kann bert siga út frá mínum royndum, at tað hevur ómetaliga nógv at siga, at tit fáa eitt tjak um, hvat tit vilja, verður oljan funnin í stórum nøgdum. Eg haldi tit hava eitt ótrúliga vakurt og gott samfelag. Tit hava einki arbeiðsloysi heldur, og tí mugu tit gera tykkum greitt, hvat tað er fyri eitt samfelag tit ynskja, eftir at oljan er komin. Tit hava eisini eina fiskivinnu, sum skal mannast. Tit mugu gera tykkum greitt, um nokk er av fólki til báðar vinnur, og sum gongdin er, má ein rokna við, at mong av teimum ungu fara at velja at arbeiða við hægri tøkni, sum tí, ið finst í oljuvinnuni.

John Thorogood vísir á, at tá oljan kom til Noregs og Skotlands, so var har eingin ivi um, at alt, sum skuldi gerast, skuldi verða gjørt í Noregi ella Skotlandi. -Norðmenn vóru sannførdir um, at sum mest skuldi gerast av norðmonnum og í Noregi. Men her mugu vit minnast til, at í mun til teirra stødd, fólkatal og aðra vinnu, so var oljan so lítil partur, at hon gjørdi ikki tann stóra munin. Men her hjá tykkum í Føroyum, har tit eru so fá og har fiskivinnan hevur so stóran týdning, har kann tað skjótt blíva ein trupulleiki, um alt arbeiði skal gerast út frá Føroyum og av fólkinum her býr.

Hann vísir á, at vilja vit halda fast við, at alt skal um føroyskan keikant, at alt virksemi skal vera her í oyggjunum, so vil tað hava við sær, at man má byggja skrivstovubygningar, skúlar, barnagarðar, íbúðir osfr. Tú verður noyddur til at innflyta í stórum tali av fólki, sum pláss skal vera fyri.

-Framtíðin kemur nógv skjótari enn nakar roknar við og tí nyttar ikki at sita og bíða við at taka upp orðaskiftið um hesa vinnuna og í hvussu stóran mun hon skal mennast í Føroyum. Man má velja. Og velur man, at øll útbygging skal fara fram í og úr Føroyum, so má ein eisini vera tilreiðar at gjalda tann prísin, og tað kann vera ein høgur prísur fyri t.d. fiskivinnuna og sosialu tilveruna í landinum annars.

John Thorogood, sum sær tað sum eina týðandi uppgávu fyri seg at fylgja við, hvat hendir í Føroyum og hvat fólk hugsa um hesa nýggju vinnu, vísir til røðuna, sum løgmaður helt á nýggjárinum. -Eg havi lisið hana við stórum áhuga og haldi hann hevði fatur á tí rætta. Í tí røðuni ávaraði løgmaður móti bara at sleppa øllum útviklinginum leysum og hann nevndi, hvørjar avleiðingar nýggja vinnan kann fáa á føroyskt mál og mentan, um føroyingar ikki eru á varðhaldi.

-Finna vit olju í tí fyrsta brunninum, hvat vit sjálvandi vóna, so fer tað heilt vist at vera ein spennandi tíð fyri føroyingar sigur John og vísir á, at tann fyrsta framleiðslan kann tá byrja longu um ár 2005 ella 6.

Spurdur um føroyaøkið og Atlantsmótið kann gerast til eina heilt nýggja oljuprovins eins og Norðsjógvurin svarar John Thorogood, at svarið liggur undir basaltinum.



*John Thorogood, leitistjóri hjá BP: -Verður nógv olja funnin mugu tit gera tykkum greitt, hvønn útvikling tit ynskja í Føroyum. Og tit mugu seta hol á orðaskiftiðnú.*

*Mynd Jan Müller*

# BP flytur í stóran skrivstovubygning

**Oljufelagið BP hevur brúk fyri meiri plássi og hevur gjørt avtalu um at leiga tvær tær ovastu hæddirnar í stóra bygninginum, har málingahandilin hjá Fróða Yviri við Strond 3 heldur til. Hjarnar Djurhuus og Fróði Sigvardsen undirskrivaðu sáttmálan fríggjadagin.**

OLJUFELØG OG SKRIVSTOVA
*Jan Müller*

Oljufelagið BP hevur brúk fyri meiri plássi og hevur gjørt avtalu um at leiga tvær tær ovastu hæddirnar í stóra bygninginum, har málingahandilin hjá Fróða Yviri við Strond 3 heldur til. Hjarnar Djurhuus og Fróði Sigvardsen undirskrivaðu sáttmálan fríggjadagin.

Nógv skal gerast við bygningin, áðrenn BP-fólkini kunnu flyta inn. Men tað hevur skund, tí oljufelagið skal til at bora sín fyrsta brunn longu í juli í ár. Báðar hæddirnar verða innrættaðar heilt av nýggum til skrivstovur og til størri arbeiðshøli eitt nú hjá tí stóra boribólkinum, sum skjótt kemur til Føroyar at taka sær av boringini.

Hjarnar Djurhuus, stjóri í BP Føroyar sigur, at teir við hesum nýggja leigumálinum fáa góðar 400 fermetrar at ráða yvir. Í løtuni leigar BP á Skansavegi 1 og skilst, at felagið enn ikki hevur tikið endaliga støðu til ta leigumálið. Fyribils koma teir so at verða á báðum støðum.

Umbyggingin fer at kosta millum 1 og 2 mill. kr. og skal verða liðug í mai-juni.



*Her úr 2. og 3. hædd í bygninginum Yviri við Strond 3 fer staburin hjá BP at húsast, nú farið verður undir at bora fyrsta brunnin á landgrunninum. Boringin ferð at verða stýrd higani.*

*Mynd Jan Müller*





*Í samfull trý ár hevur Dick Hentze gjørt eitt stórt arbeiði fyri at finna røtur sínar í Føroyum. Nú er dreymur hansara gingin út, og hann hevur m.a. vitjað húsini, har langomma hansara er uppvaksin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Leitar eftir ætt síni

**Í 1888 fluttu hjúnini Jóhan Michael Hentze Joensen, vanliga róptur Jóhan í Skemmuni, og Arina Poulsen, vanliga kallað Arina í Soylu, av Sandi til Danmarkar og stutt eftir til gekk leiðin til tvørturum hav til USA. Nú er Dick Hentze, sum er triðja lið av eftirkomarum hjá hjúnunum av Sandi, í Føroyum og leitar eftir skyldfólki**

ÆTTARGRANSKING
*Stefan í Skorini*

Hann hevur leingi havt hesa ferðina í huganum. Nú tók hann sær endiliga um reiggj og fór ta longu leið úr USA til Føroyar, har røtur hansara liggja.

– Hetta hevur verið ein sera væleydnað ferð, og eg gleði meg ómetaliga nógv til at koma heimaftur og siga familju míni frá øllum upplivingunum, eg havi havt her í Føroyum. Eg veit eisini, at tey eru forvitin eftir at hoyra meira um Føroyar og skyldfólkini her, sigur ein fegin Dick (Richard) Hentze um ferðina, sum nú er at enda komin.

55 ára gamli amerikumaðurin sigur, at hann hevur fingið samband við nógv av skyldfólkum sínum í Føroyum, og tað er hann fegin um. Eisini hevur hann vitjað í húsunum, sum verða kallað í Soylu á Sandi, har langomma hansara vaks upp.

– Næstan allir føroyingar, sum eg havi møtt, hava áhuga fyri familjuviðurskiftum, og tað hevur gjørt mítt arbeiði her nógv lættari, tí tað er jú familju, eg havi sóknast eftir, sigur Dick, sum heldur tað vera stuttligt, at føroyingar eru so væl vitandi um síni familjuviðurskifti.

Dick er longu farin at leggja ætlanir um enn eina ferð til Føroya í summar, og tá verður gamli faðir Dick eftir ætlan eisini við á ferðini.

## Grundløgdu danska búseting

Jóhan Michael og Arina fóru víðari til USA, har tey fyrst settu búgv í Chicago miðskeiðis í USA.

Tey fluttu síðani vestureftir og keyptu jørð í Oregon, har ein dani var farin undir at grundleggja eina danska búseting. Í 1902 flutti familjan Hentze í ta donsku búsetingina í Oregon.

Tá familjan kom til USA fingu tey at vita frá myndugleikunum, at tey skuldu skifta eftirnavn, tí at ov nógv fólk itu Joensen. Tey gjørdu tí av at sleppa sær av við tað eftirnavnið, og vóru eftir hetta bara kend undir eftirnavninum Hentze, sum er kent á Sandi.

Meðan tey vóru í Chicago føddi Arina tveir synir, og vórðu teir nevndir Einar og Búe. Báðir dreingirnir vuksu upp á bóndagarðinum í Oregon. Einar er abbi Dick, men hann tosaði ongantíð um Føroyar, haðani foreldur hansara vóru ættað.

Einar giftist við eini norskari gentu, hvørs foreldur eisini vóru flutt til USA. Í brúðargávu fingu tey ein bóndagarð í tí donsku búsetingini og hildu sostatt fram á sama staði.

Omma Dick er norsk, og hann hevur hugsað um at fara til Noregs at finna skyldfólk har, men ongar ítøkiligar ætlanir eru um tað enn. Dick veit tó um eina familjustevnu í Noregi, har skyldfólk hansara koma saman fimta hvørt ár, so tað skuldi ligið væl fyri at sett seg í samband við skyldfólkini í Noregi.

## Búe vakti áhugan aftur

Abbabeiggi Dick, sum kallast Búe, var tann, ið vakti áhugan hjá Dick fyri fjarskotnu oyggjunum Føroyum.

Dick greiðir frá, at abbi hansara, Einar, ongantíð vildi tosa um Føroyar, men hann dugir tó ikki at siga, hví hetta var so.

Sum ungur fór Búe til Alaska at arbeiða. Hetta var í 1953, tá Dick var átta ára gamal. Ikki fyrr enn 24 ár seinni í 1977 sóust teir báðir aftur. Tá hevði Búe búð í sama býi sum Dick í fleiri ár, men teir vistu ikki av hvørjum øðrum.

Eftir at Dick hevði funnið abbabeiggjan aftur, kom hann ofta í heim hansara, og tað var Búe, ið vakti áhugan hjá Dick fyri Føroyum, hóast Búe ongantíð var her á landi.

Búe doyði fyri stuttum, og hann gjørdist 104 ára gamal.

## Verið heppin

Dick sigur seg hava havt hepni við sær, tá hann kom til Føroyar.

– Eg havi verið ómetaliga heppin á míni ferð, tí øll fólk hava verið so hjálpsom og hava skilt, hvørjum eg stríðist fyri uttan at seta nakrar spurningar. Eg havi nátt mínum máli á hesum sinni, men enn er nógv eftir at kanna. Eitt nú havi eg næstan bara kannað familjuna á Sandi, men eg havi eisini skyldfólk aðrastaðni í Føroyum, sum eg ætli mær at finna, tá høvi aftur býðst, sigur Dick.

Langomma Dick, Arina, hevði ein beiggja, ið nevndist Jens Michael, sum giftist við systur langabba Dick, og tey búðu á Sandoynni. So Dick hevur nógv skyldfólk, sum eru eftirkomarar hjá Jens Michael.

Dick hevur havt nógv samband við Michael Olsen á Sandi, sum er hansara nærmasta familja her í Føroyum, og hann hevur búð hjá Nielsi Olsen á Sandi.

Dick sigur seg tó bara hava nomið við yvirflatuna enn, og hann ætlar sær í holt við familjuna í Skemmuni í Suðuroy, sum Dick eisini er skyldur við.

– Tað hevur stóran týdning fyri meg sum persón at kenna mínar røtur, og tí havi gjørt so nógv fyri at finna tær. Tað er torført at greiða frá, men eg havi eitt sterkt ynski eftir at kenna mínar røtur, sigur Dick Hentze, sum alt sítt lív hevur verið lærari í barnaskúlanum, men er nú farin frá við eftirløn.

Sum heild hevur Dick fingið nógv burturúr ferð síni í Føroyum, og honum dámar serliga væl tær lítlu bygdirnar heldur enn tey størru plássini. Eisini heldur hann tað vera stuttligt at síggja tann stóra politiska áhugan hjá føroyingum, nú so stórar rembingar hava verið á tí økinum.